# Favorittarnir hittast í hálvfinaluni

**VB-Stjørnan og VÍF-Kyndil standa á skránni í hálvfinaluni í steypakappingini í hondbólti**

COCA-COLA KAPPINGIN

*Jákup Mørk*

Stóru favorittarnir í coca-cola kappingini hjá kvinnum og monnum tørna saman í hálvfinalunum. Hetta stóð greitt, tá Hondbóltssambandið seinasta hósdag kastaði lut um, hvussu teir fýra hálvfinalistarnir skulu spæla um finaluplássini.

Hjá monnum hittast tey bæði oddaliðini, Kyndil og VÍF í aðrari hálvfinaluni, meðan finalistarnir frá í fjør, StÍF og H71, hittast í hinari hálvfinaluni.

Hjá kvinnunum leiktu VB og Stjørnan í fjør eina sera spennandi finalu, men talan verður so ikki um endurtøku hesaferð. Tey bæði oddaliðini hittast nevnliga longu í hálvfinaluni. Hin hálvfinalan hjá kvinnunum stendur millum nummar trý og fýra í landskappingini. Nevnliga Neistan og Søljuna.

Dystarskráin fyri hálvfinalunar sær annars soleiðis út:

**12. januar**
**Kvinnur**
VB-Stjørnan
Søljan-Neistin

**Menn**
H71-StÍF
Kyndil-VÍF

**26. januar**
**Kvinnur**
Stjørnan-VB
Neistin-Søljan

**Menn**
StÍF-H71
VÍF-Kyndil



*Bæði hjá kvinnum og monnum tørna oddaliðini í landskappingini saman í hálvfinalunum í steypakappingini*

## VB-venjarin funnin

VB hevur gjørt avtalu við 46 ára gamla John Christensen um, at hesin skal venja besta mansliðið hjá felagnum komandi kappingarár.

John hevur tey bæði seinastu árini verið ungdómsvenjari í felagnum, og eitt tíðarskeið í 2003 stóð hann eisini á odda fyri venjingini av besta liðnum.

John hevur øll tey neyðugu prógvini, sum í dag verða kravd av venjarum í bestu deildini, og eisini hevur hann ferðast víða um í royndunum at styrkja um venjaraførleikan. Eitt nú var í heyst á venjaraskeiði í Brasilia.

-jm

## HEILSANIR



**Góðu Eyðbjørg og Eyðun**
Hesi fittu børnini verða 25 ár í dag. Tey eru líka fitt enn. Tað takka vit fyri. Hjartaliga tillukku.
**Ynskja eldru systkini**



**Góða kona**
Hjartaliga tillukku við teim 39 árunum. Takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Tín egni stari**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 4. jan. Alt gott ynskja vit tær.
**Heilsan omma og abbi**



**Góða Tove**
Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum 3. jan.
**Ynskja vit á Rókini**



**Góða Ann Maria**
Tillukku, tillukku, tillukku.
**Gita hvør**



**Elskaði Ári**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja vit øll í húsinum**



**Góða Ann Maria**
Vit hava báðar føðingardag sama dag, so nú fært tú eina føðingardagsheilsan og stórt tillukku frá mær.
**Ein onnur úr Sandavági**



**Ein heks og onnur**
Hjartaliga tillukku við degnum 1. jan.
**Ynskir hin heksin**


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................
..................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ..........................................................

Bústaður: ....................................................

Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«